# Ársfrágreiðing fyri skúlaárið 2023/2024

# Skúlin í Eysturkommunu

Síðani 1. januar 2013 hevur leiðslan í skúlanum fyri Eysturkommunu virkað við einum skúlastjóra og einum varaskúlastjóra/ deildarleiðara. Atli Fróði Johansen er skúlastjóri, og Annika Katrin Joensen er varaskúlastjóri/deildarleiðari. Leiðslan hevur eitt skrivstovufólk afturat sær hálva tíð.

Skúlastýrið hevur eftirlit við virksemi skúlans, sum ikki er lagt undir aðrar mynduleikar. Í skúlastýrið verða trý foreldraumboð vald, tvey kommunustýrisumboð og eitt starvsfólkaumboð. Formaður og næstformaður skulu veljast millum foreldraumboðini. Skúlastjórin er skrivari í skúlastýrinum. Skúlastýrið, sum tók við í 2021, skipaði seg soleiðis:

Eydna Lucia Nesá, forkvinna
Katrin Ingolfsdóttir Gregersen, næstforkvinna
Elinborg Osvaldsdóttir, foreldraumboð
Magnus Skoralíð, kommunustýrisumboð
Marjun Andreasardóttir kommunustýrisumboð, Elisabeth Hansen, starvsfólkaumboð og Atli F. Johansen, skrivari.
1. varalimur er Noomi Gregersen og 2. varalimur er Rebekka Olsen fyri foreldrini.

Skúlastýrið situr í 4 ár.

Í 2021 var skipað fyri einum felags skúlastýrisfundi saman við skúlastýrinum úr Fuglafjarðar skúla. Hettar riggaði væl og var avgjørt at endurtakað hettar samstarvið árliga.

# Næmingar

Skúlaárið 2023-2024 ganga 274 næmingar í skúlanum. 138 í Skúlaspíranum og innskúlingini í Leirvík og 136 í miðdeildini í Gøtu.

Árgangirnir eru um 35 næmingar í miðal.

Hetta er í nógvar mátar ein góð skúlastødd. Bæði fyri einstaka næmingin og fyri skipanina av undirvísingini og skúladegnum. Næmingatalið ger nevniliga, at allir næmingar hava lættari við at finna sín javnlíka og trívast, og skúlin fær eisini so mikið væl av tímum, at til ber hjá leiðslu og lærarum at fyriskipa og geva eina góða og fjølbroytta undirvísing.

# Starvsfólk

Í skúlanum eru 26 lærarar, 2 námsfrøðingar, sum arbeiða í Skúlaspíranum og 6 námsfrøðiligir stuðlar.



# Mannagongdir og vegleiðingar

Skúlin í Eysturkommunu hevur fleiri mannagongdir og vegleiðingar, sum eru til at taka í ávísum støðum, og aðrar eru við til at mynda dagligdagin á skúlanum.
Á vári 2017 var trivnaðarætlanin góðkend av Mentamálaráðnum. Ætlanin er rættuliga umfatandi, hon umfatar nógvar lutir, sum á ein ella annan hátt kunnu vera viðkomandi fyri at skapa tryggleika og trivna á einum skúla.
Somuleiðis hevur skúlin eina sorgarætlan. Sorgarætlanin er gjørd fyri, at foreldur, lærarar og leiðsla skulu vita, hvør mannagongd verður brúkt, tá sorg rakar skúlan.
Ætlanirnar kunnu lesast á skeyk.fo.
Frávera á skúlanum verður nú skrásett talgilt.

# Hølisumstøður

Vit fegnast um at Eysturkommuna hevur raðfest at seta pening av til viðlíkahald av skúlunum. Samanumtikið eru hølisumstøðurnar góðar á fleiri økjum, men skúlastýrið og starvsfólk hava tó havt nøkur ynski um ábøtur bæði í skúlanum í Leirvík og í skúlanum við Gøtugjógv. Hóast langt er eftir á mál, so eru tó fleiri ábøtur gjørdar á skúlunum undanfarna skúlaár. Í Leirvík eru fleiri ábøtur gjørdar. Svimjihylurin er dagførdur, tekjan er skift, loftið í ovaru gongini er umvælt. Arbeitt hevur verið við eini heildardagføring av skúlanum og fimleikahøllini. Hetta arbeiðið er nú komið so langt, at umbyggingin verður nú projektera. Við Gøtugjógv er fimleikahøllin klødd av nýggjum, og vindeyguni í fimleikahøllini og á Bókasavninum eru skift. Tá hetta arbeiðið er liðugt, verður væntandi arbeitt við at dagføra bygningin innan. Harumframt eru størri umvælingar í gongd í nátturu og tøkni stovuni.

Beint fyri summarfrítíðina í 2024, varð ein arbeiðsbólkur settur, sum skal arbeiða við eini heildarætlan fyri allar bygningarnar í skúlanum við Gøtugjógv

**Innskúlingin**
Allir átta flokkar hava sína floksstovu, so nú ber til at býta allar árgangirnar. Serstovan/førleikastovan hevur eina stovu, sum kann býtast í tvey. Harumframt hevur skúlin fimleikahøll, svimjihøll, bókasavn og miðhøll og eina stovu til fyrireiking. Tó harmast vit um at vit mangla fakstovur og bólkarúm í innskúlingini. Og onkrar av floksstovunum treingja til ábøtur.

**Miðdeildin**
Allir átta flokkar hava sína floksstovu, og førleikastovan hevur sína egnu stovu. Harumframt hevur skúlin fimleikahøll og bókasavn og serstovur til tónleik, heimkunnleika, smíð, evning og náttúrulærugreinar.

# KT

Síðsta árið hevur verið arbeitt við at gerast partur av S*kúlanet*, sum er ein liður í at gera KT-skipanirnar tryggari hjá skúlanum. Hettar fer at seta størri krøv til KT-útgerðina hjá skúlanum.

# TÍTT

Síðani 2014 hevur innskúlingin verið við í TÍTT. Skipanin verður eisini brúkt í dagstovnunum og frítíðarskúlanum. TÍTT merkir "tiltøk í tøkum tíma". Endamálið við hesi skipan er at fylgja trivnaðinum hjá øllum næmingum og at seta inn við hjálp hjá næmingum, sum av eini ella aðrari orsøk ikki trívast nóg væl. Ætlanin er nú eisini at fara undir at brúka TÍTT í miðdeildini.

## Uttanduraøkið

Í **innskúlingini**
Skúlastýrið og starvsfólk hava enn stórt ynski um at dagføra uttanduraøkið við Leirvíkar skúla.

Í **miðdeildini** hava børnini tveir góðar FIFA-vøllir at spæla á. Næmingarnir skiftast um at brúka hesar vøllir.

Næmingarnir hava eisini eitt gott øki millum skúlabygningarnar, sum er lagt við asfalti. Her ber til at spæla onnur spøl. Umframt hetta sleppa børnini at spæla runt um allan skúlan.

## Felagstiltøk fyri skúlarnar

Umráðandi er skapa nakrar felags siðvenjur fyri skúlan, sum kunnu styrkja samleikan og kunnleikan hjá næmingum, starvsfólki, foreldrum og lokalumhvørvinum sum heild. Jólini og dansitíðin hava í so máta hepnast sera væl.

Síðsta skúladag fyri jól fara allir næmingarnir í kirkju. Kirkjugongdin verður annaðhvørt ár í Leirvík og annaðhvørt ár í Gøtu.

Felagsdansidagarnir eru tveir í tali. Ein í Leirvík og ein í Gøtu. Avtalað er, hvørji kvæði vit læra, so allir næmingarnir hava lært tað sama.

## Skipanir og tiltøk

**Mjólkarskipanin** er ein skipan, har allir næmingar kunnu keypa mjólk í skúlanum.

**Litir í leiki**. Hetta er eitt tónleikatilboð í 1. til 3. flokki, har tað við miðvísari undirvísing og samanspæli hvørja viku verður arbeitt við at menna tónleikaliga førleikan hjá næmingunum.

**Jól**
Innskúlingin hevði jólahald beint fyri jól fyri foreldrum og avvarandi. Miðdeildin hevði jólahald tíðliga í desember. Eisni bjóðaðu tey ommum og abbum til jólahald um morgunin. Hettar eydnaðist avbera væl.

**Føstulávint**
Á føstulávint vórðu foreldur og avvarðandi boðin inn í skúlarnar at kvøða. Hetta eydnaðist sera væl.

**Eftirmetingar** av øllum næmingum eru tvær ferðir árliga. Hesar eftirmetingar verða brúktar í sambandi við foreldraviðtalur.

**Foreldrafundir og foreldraviðtalur** eru tvær ferðir árliga. Har kunna starvsfólkini foreldrini um skúlagongdina.

**Rennidagur** er fyrst í skúlaárinum, og verður hesin lagdur ein góðveðursdag.

**Útferðir** verða gjørdar. 3. og 6. flokkur ferð á hvørjum ári á seturskúla í Føroyum við flokslæraranum.

**Vikuskematímar**
Nakrir lærarar arbeiða nakrar tímar um vikuna við einum øðrvísi hátti at skipa tímarnar. Hátturin er danskur og kallast *Ugeskemarevulutionen.*

**Eldrasambýlini**
Innskúlingin liggur tætt við Giljagarð. Her hevur skúlin ta skipan, at ein flokkur fer hvørja viku at vitja. Næmingarnir heilsa upp á búfólkini og syngja fyri teimum. Giljagarður bjóðar bollar og kakao.

**Sjónleikur - E-nám**
Í mars vóru næmingar úr skúlanum í Eysturkommunu og hugdu eftir sangleiki í Fuglafirði. Tað vóru næmingar á sangleikarabreytini í Enám, sum framførdu leikin Mamma Mia.

**Skúlaleikir**
Aftur í ár luttók miðdeildin í Skúlaleikum. Í Skúlaleikum verður dentur lagdur á felagsskapin í flokkinum og gleðina við at røra seg. Næmingarnir fáa eina uppliving saman, vinna sær stig saman og fáa eyka stig fyri at heppa á hvønn annan. Øll skulu kenna seg væl, tí Skúlaleikir eru fyri øll.

**Næmingaráð**
Í miðdeildini er eitt næmingaráð skipað. Ein næmingur úr hvørjum flokki verður valdur inn í næmingaráðið, sum í ár eru átta í tali. Signar á Reynatrøð er samskipari fyri næmingaráðið. Næmingaráðið hevur fund av og á og skipar fyri 2-3 tiltøkum um árið.
Næmingaráðið hevur til uppgávu at arbeiða fyri áhugamálum hjá næmingum í skúlanum, m.a. viðurskifti, ið hava við skúlagongdina, sosial viðurskifti og gerandisdagin í skúlanum at gera.

**Telefonpolitikkur**
Nýggjur telefonpolitikkur bleiv tikin í nýtslu á heysti 2023, har stórsti dentur varð lagdur á, at næmingar ikki hava snildfon við í skúla. Hesin politikkur kann síggjast á heimasíðuni hjá skúlanum.

**Betri Vinir**
Við skúlaársbyrjan var tiltakið "Betri vinir" á skránni í innskúlingini í Leirvík. Endamálið við tiltakinum er at styrkja barnafelagsskapin og fyribyrgja happing.

**Altjóða læraradagur**
Í oktobur 2023 var skúlin í Eysturkommu við til at hátíðarhalda Altjóða læraradagin. Hettar riggaði avbera væl og vóru lærara, námsfrøðingar og næmingar væl nøgdir við løtuna.

**Atferðarreglur við Eysturleiðini**
Eftir áheitan frá næmingaráðnum hevur kommunan í samstavi við AP-bussar gjørt atferðarreglur í samband við bussleiðina. Skúlastjórin og stjórin hjá AP-bussum vóru og kunnaðu næmingarnar bæði í byrjunar- og miðdeild um nýggju reglarnar. Næmingarnir hava allir fingið faldara heim um atferðarreglurnar.

**Skúlatalv**
Sum liður í undirvísingini í støddfrøði hava næmingar í Skúlanum í Eysturkommunu høvi at læra at spæla talv. Harumframt fáa allir næmingar, sum hava hug, møguleikan at luttaka í FM í skúlatalvi.
FM-finalurnar vóru í ár hildnar í Finsen í Havn, og royndust hesar særa væl fyri okkara næmingar. Í finaluni fyri 5.-8. flokk vóru tað næmingar úr Skúlanum í Eysturkommunu, sum vunnu kappingina.

# Heimasíðan

Á heimasíðuni hjá skúlanum skeyk.fo verður kunnað um tiltøk og annað í skúlanum. Heimasetningurin er somuleiðis at finna á heimasíðuni.
Skeyk stendur fyri **sk**úlin í **Ey**stur**k**ommunu.